

West Hercules, ið Seadrill eigur. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Íleggjarar hava ikki álit á West Hercules-eigarunum

**Jógvan Hugo Gardar**

19.09.2014 - 10:50

Oljan.fo

Altjóða partabrævagreinarar hava ikki tað stóra álitið á Seadrill, ið eigur West Hercules-boripallin.

TDN Finans boðar í morgun frá at greinararnir hjá Exane hava givið Seadrill støðuna "underperform". Kursmálið er sett niður frá 220 norskum krónum til 172 norskar krónur. Tað merkir á gerandismáli: sel partabrøvini skjótast til ber.

Exane roknar við at partabrævaeigararnir ikki koma at fáa tað stóra útgoldið við tað fyrsta. Orsøkin er støðan í marknaðinum fyri boripallar, umframt skuldarstøðan hjá Seadrill.

Partabrævið er lækkað í virði seinastu tíðina.